– Oljan er svørt …

Sosialurin hitti eisini 8 ára gomlu Rannvá og 13 ára gomlu Anniku á Náttúrugripasavninum.

Tær høvdu hoyrt um framsýningina, og saman vóru tær nú farnar á skattajakt. Dúgliga varð leitað eftir olju, fiskum og fuglum, og tær sóu út til at hugna sær óført.

- Vit eru ikki í familju, sjálvt um vit fylgjast, fortelur Annika okkum og hyggur uppá Rannvá.

- Nei, vit fylgjast bara, leggur Rannvá afturat.

Tær báðar vinkonurnar greiða frá, at tær hava verið á skattajagt, og tað dámdu teimum heilt væl.

- Men okkurt var eitt sindur ringt, heldur Rannvá.

Tær hava eisini verið og hugt eftir beinagrindunum av hvalum. Tær vóru ordiliga flottar, hildu tær.

Prátið fellur inn á olju, og tað hoyrist, at hetta hava tær báðar prátað um fyrr.

- Olja er svørt og flótandi, og onkrir bilar brúka eisini olju at koyra við, greiðir Annika okkum frá.

Vit lata tær báðar sleppa víðari á skattajagt, og takka teimum fyri hugnaliga prátið.

– – –

Vinmennirnir og floksfelagarnir báðir, Eyðun og Teitur, standa og kanna eina mynd av einum manni, sum stendur á einum oljupalli. Hvørgin teirra hevur nakrantíð sæð veruliga olju, men teir standa ein góða løtu framman myndina og kjakast ófört:

- Olja er sóritt, sum man blívur ríkur av, heldur Eyðun.

Teir vita, hvussu ein boripallur sær út, og prátið fellur á borikrúnur, ymisk hjól og eisini vanligar borimaskinur. Hetta halda teir er ordiliga spennandi.

Mamman hjá Eyðun bað teir fara ein túr oman á savnið at vitja framsýningina, og tað angra teir ikki eina løtu.

- Vit ætla okkum at vera her ordiliga leingi, sigur Teitur, áðrenn vit lata teir báðar sleppa víðari.

– – –

Sosialurin hitti eisini eina mammu, sum saman við børnunum hevði leitað sær oman á framsýningina.

- Hetta er eitt gott høvi at læra børnini okkurt. Og so er tað enntá eisini hugnaligt, helt mamman, Randi Gregersen.

Og børnini hugnaðu sær. Tey høvdu fingið hvør sín ispinn, sum kallaðist Oljudropin, og hetta dámdu teimum væl.

12 ára gamla Valgerð, 8 ára gamla Kristvør og 5 ára gamli Hallur eru øll samd í, at skattajagtin var mest spennandi.

- Men vit hava eisini hugt eftir djórunum - sindur løgið at hugsa um, at tey einaferð hava verið livandi, heldur Kristvør.

Valgerð greiðir okkum frá, at hetta avgjørt var nakað, sum hon fer at fortelja floksfeløgunum um, tá hon aftur skal í skúla eftir heystfrítíðina.

- Eg hevði bara ynskt, at vit høvdu eitt sindur betri tíð á savninum. Vit fóru ov seint heimanífrá, og við trimum børnum gongur tíðin alt ov skjótt. Men hetta er eitt gott hugskot við tiltakinum. Tað kundi gott verið meira av slíkum í Føroyum, sigur Randi, áðrenn lítli Hallur halar mammuna víðari til okkurt spennandi, sum hann nú hevur borið eygu á.

Á skattajagt í Náttúrugripasavninum:

Børnini hugnaðu sær

Í heystfrítíðini skipaðu Náttúrugripa- og Jarðfrøðisavnið fyri eini viku, har størsti denturin varð lagdur á børnini. Endamálið var fyrst og fremst at vekja áhuga fyri teim framsýningum, sum savnini liggja inni við

FRAMSÝNING
Ragnhild Ellingsgaard

Børnini hugnaðu sær við skattajagtum og Oljudropum

"Mamma, hvat er hattar ?", spyr ein lítil genta, meðan hon togar í jakkaermuna hjá mammuni, sum stendur við einum kaffikoppi í hondini.

Tær báðar standa undir liðini av eini beinagrind, sum er fleiri ferðir størri enn smágentan.

Mamma greiðir gentuni frá, at hetta hevur einaferð verið ein stórur hvalur, men gentan hevur ikki tollyndi til at bíða. Hon er longu farin víðari í framsýningini, og stendur nú ótolin við ein annan lut og bíðar eftir mammuni.

Sosialurin er staddur á Náttúrugripasavninum, sum í heystfrítíðini skipaði fyri einum tiltaki, sum serliga var ætlað børnum.

Rundan um okkum renna børn í øllum aldri; tey flestu við penn og pappíri í hondini. Tey eru farin á skattajagt, og skunda sær alt tey kunnu fyri at gerast liðug. Tá fáa tey nevniliga ein leskiligan Oljudropa frá starvsfólkunum á savninum.

Komandi oljuverkfrøðingar

Í meðal 180 vitjandi, bæði børn og foreldur, hava um dagin vitjað á framsýningini, sum í heystfrítíðini serliga var ognað børnunum. Hetta er eitt tal, sum er nógv omanfyri vanliga vitjunartalið hjá savninum.

- Vit hava tó ikki broytt framsýningina nakað. Hon er enn tann sama, men vit hava havt ymsar aktivitetir á skránni, sum serliga hava verið ætlaðir børnum, greiðir Palli Askham, ein av fyrireikarunum, frá.

Í framsýningini "Oljuleiting í Føroyum" hava børnini roynt sítt hugflog við ymsum uppgávum. Eisini varð skipað fyri eini sonevndari skattajagt, har hvørt barn skuldi finna og kenna ymsar lutir, sum eru at finna á framsýningunum. Og um onkur var vorðin troyttur, so bar eisini til at seta seg niður við eitt borð at tekna.

Áhugin fyri tiltakinum hevur eisini verið ovurhonds stórur, tí ongantíð áður hevur Náttúrugripasavnið havt so nógvar vitjanir í so stuttum tíðarbili.

- Børnini hava víst stóran áhuga fyri framsýningi, og eingin hevur sett seg aftur við ymsum spurningum viðvíkjandi teim lutum, sum eru at finna í savninum. Eftir áhuganum at døma, so ivist eg onga løtu í, at vit finna onkrar komandi oljuverkfrøðingar millum teirra, sum hava vitja savnið her seinastu dagarnar, sigur Palli skemtandi.

Afturvendandi tiltak

Hetta er fyrstu ferð, at Náttúrugripa- og Jarðfrøðisavnið hava skipað fyri tiltøkum, har størsti dentur hevur verið lagdur á yngra ættarliðið.

Endamálið við tiltakinum var fyrst og fremst at vekja áhugan hjá børnunum fyri teim lutum, sum savnið liggur inni við. Men dentur varð eisini lagdur á, at børnini skuldu hava eina hugnaliga løtu saman við starvsfólkunum á savninum.

Sambært Palla Askham verður hetta tó ikki seinastu ferð, at farið verður undir slíkt tiltak.

- Vit høvdu als ikki væntað, at tiltakið fór at fáa so góða undirtøku., og vit eru sera væl nøgd, nú vikan er farin afturum. Av tí sama ivist eg heldur onga løtu í, at vit fara undir fleiri líknandi tiltøk í framtíðini, greiðir Palli frá.

Fyribils fer savnið at leggja seg eftir at skipa fyri barnavinarligum tiltøkum í hvørji heystfrítíð, og møguliga verða eisini onnur tiltøk á skránni.

- Hetta veldst sjálvandi eisini um, hvørjar framsýningar verða at síggja á savninum. Men okkurt verður so á skránni komandi heyst, sigur Palli at enda.

Umleið 180 vitjandi um dagin. So væl tóku børnini undir tiltakinum, sum Føroya Náttúrugripa- og Jarðfrøðisavnið skipaðu fyri í heystfrítíðini

Ungdómsmentanarstevnan:

Ung í Føroyum 2003

UNGDÓMSSTEVNA
Tíðinaskriv

Á øðrum sinni skipar Norðurlandahúsið fyri eini tvørlistarligari mentanarstevnu fyri ung í aldrinum 13 til 18 ár.

Ung í Føroyum 2001

Fyrsta stevnan av hesum slag var í februar 2001 og var hon sera væl eydna. 60 ung frá øllum landinum arbeiddu eitt vikuskiftið við teimum ymisku listagreinunum og úrslitið var víst fram fyri almeninginum á einum "opnum húsið" í Norðurlandahúsinum 3. stevnudagin, og eisini varð ein ferðandi listaframsýning sýnd fram á ymsu deildunum hjá Føroya Banka, sum stuðlaði stevnuni, og SvF hevði eina sending, ið viðgjørdi alla stevnuna.

Norðurlendskar fyrimyndir

Fyrimyndin til hesa stevuna fingu projektleiðaranir Hedvig Westerlund og Rakel Helmsdal úr Noregi og Svøríki, har tey hava eitt tiltak, ið kallast "ungdommens kulturmönstring". Hetta er skipað sum kappingar í teimum ymsu kommununum um alt landið, har ung sjálvi fyrireika og vísa fram tey ymsu listarligu økini, tey fáast við. Vinnarnir verða síðani við í eini landspartakapping, og vinnararnir av hesi, fáa møguleika at vera útvald at vera við á norðurlendskum stevnum. Hesi tiltøk eru serliga áhugaverd, tí tey sýna, hvat tey ungu fáast við og eru áhugaði í, ikki hvat tey vaksnu halda, at tey ungu eru áhugaði í.

Føroyskt model

Av tí at Føroyar eru smáar, var í fyrsta umfarið avgjørt at gera ein mentanarstevnu har tað listarliga samstarvið og felags úrslitið standa í miðdeplinum. Ung úr øllum partinum av landinum skuldu hava møguleika at sýna fram tað, tey gera, og fáa listarliga vegleiðing frá yrkislistarfólkum, og soleiðis "snodda" eitt sindur til, hvat tað vil siga, at arbeiða við list burturav.

Ung í Føroyum 2003

Tann 31. januar 2003 verður onnur UiF-stevnan so sett, og eitt vikuskiftið við listarverksmiðjum, framførslum og framsýning byrjar.

Listagreinarnar, sum hesaferð verða umboðaðar eru: Myndlist, tónleikur, video, dansur, skriving, sjónleikur. Tvær myndlistaverksmiðjur verða, tvívídda (2D) list og trívídda (3D) list, og fyri teimum koma Guðrið Poulsen og Karstin Olgar Lamhauge at standa. Tónleikurin verður eisini býttur í tvey, ein kórverksmiðja, sum Bjarni Restorff leiðir og ein við instrumentalum tónleiki, sum Kári Jacobsen stendur fyri. Skriviverksmiðjan verður hesaferð við Mariannu Debess Dahl, og video verður eins og seinast við Jákup Veyhe. Til at leiða dansiverksmiðjuna kemur ein kendur danskur dansiverksmiðjuleiðari, Peter Friis. Og sum nakað nýtt, verður sjónleikaverksmiðjan í Ung í Føroyum 2003 fyri ung, ið eru antin rerslu- ella menningartarnað. Tað verður Jórun Simonsen, ið fer at leiða hesa verksmiðjuna.

Stevnan byrjar við, at tey ungu sýna egnu list sína fyri hvørjum øðrum, og endar eisini hesaferð við eini felagssýning av úrslitunum av verksmiðjunum fyri almeninginum sunnudagin tann 2. februar. Tað verður Vár Jacobsen, sum fer at samskipa hesa sýning.

Tilmeldingarfreistin er 15 novembur!!!

Í hesi vikuni fáa øll ung millum 13 og 18 ár eitt bræv í skúlanum ella á teimum ungdómsstovnum (skótarørslur o.t.), tey ganga á, sum greiðir frá UiF2003 og bjóðar teimum at melda seg til. Tey, ið eru farin úr skúlanum og ikki ganga á nøkrum stovni, eru sjálvandi eins vælkomin at melda seg til. Tey skulu bara fara inn á heimasíðuna hjá Norðurlandahúsinum, http://www.nlh.fo og fáa sama tilfari og tilmeldingarblaði, - eisini ber til at ringja til 317900 ella skriva til uif@nlh.fo.

60 ung úr øllum landinum kunnu vera við á stevnuni. Tikið verður móti tilmeldingum til 15. novembær 2002. Tey, ið ætla at sýna egnu list sína á stevnuni, verða tikin framum.

Fyriskiparar

Tað eru Rakel Helmsdal, rithøvundi, og Hedvig Westerlund, teaturpedagogur, sum eru leiðarar og fyriskiparar av UiF2003 fyri Norðurlandahúsið.

Annlis Bjarkhamar, mentamálaráðharri, er verndari fyri stevnuni og Mentamálaráðið og Føroya Banki hava stuðlað tiltakinum bæði fyrru ferðina og nú.

Norðmenn útflyta vánaliga alifisk

ALIFISKUR
Jógvan Hugo Gardar

Noreg: Norska fiskimálastýrið, Fiskeridirektoratet, ákærir útflytarar av alifisk fyri at selja fisk av so vánaligari góðsku, at hann ongantíð skuldi verið farin av sláturstøðini.

Tað er stjórin fyri eftirlitsdeildini í fiskimálastýrinum, Aksel Eikemo, sum sigur hetta við norska útvarpi, NRK.

Hann sigur, at teir fleiri ferðir hava funnið fisk, sum hevur verið á marknum til ikki at vera klárur til útflutnings.

Laksurin verður býttur í tríggjar bólkar: Besti fiskurin kallast »Superior«, síðani kemur »Ordinær«, meðan tann seinasti bólkurin kallast »framleiðslufiskur«, og tað er bannað at útflyta hendan bólkin.

Men norskir myndugleikar siga, at hetta hendir kortini. Seinast fyri 14 døgum síðani steðgaðu teir einum bili við 19 tonsum av framleiðslulaksi: Bilurin var á veg til Danmarkar. Intrafish.no skrivar, at tveir útflytarar eru meldaðir til løgregluna, ein í Finnmark og ein í Oslo.

Sambært Aksel Eiko hava teir eyguni við fleiri øðrum útflytarum, og hesir eru spjaddir um alt Noreg.